# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




**SUBARU LEGACY 2.0 AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AD 873 **Km:** 100.000
**Árgangur:** 09.03.2006

**kr. 225.000,-**



**NISSAN ALMERA 1.8** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SK 212 **Km:** 84.000
**Árgangur:** 01.04.2003

**kr. 98.000,-**



**TOYOTA RAV 4 2,0 VVT-I** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VS 482 **Km:** 30.000
**Árgangur:** 04.09.2006

**kr. 284.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.3 SEDAN**

**Skrásetingarnr:** DT 976 **Km:** 127.000
**Árgangur:** 09.06.1999

**kr. 54.000,-**



**SSANGYOUNG MUSSO 2.8 TD**

**Skrásetingarnr:** HD 986 **Km:** 75.000
**Árgangur:** 08.04.1998

**kr. 58.000,-**



**CITROEN BERLINGO 1.6** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KB 559 **Km:** 36.000
**Árgangur:** 05.04.2004

**kr. 115.000,-**



**TOYOTA AVENSIS SOL STC.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** PK 326 **Km:** 30.269
**Árgangur:** 13.03.2006

**kr. 248.000,-**



**TOYOTA AVENSIS SOL AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** PK 891 **Km:** 67.000
**Árgangur:** 23.03.2004

**kr. 190.000,-**



**TOYOTA YARIS VERSO 1.3 LUNA**

**Skrásetingarnr:** PL 937 **Km:** 139.673
**Árgangur:** 12.01.2000

**kr. 75.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 H/B LUNA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SP 208 **Km:** 6.000
**Árgangur:** 07.11.2007

**kr. 214.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Ung ynskja bommverksmiðju



*Næmingarnir vitja bygdaráðið – aftast vinstrumegin Herálvur Jacobsen, lærari og honum við lið Jákup Suni Lauritsen borgarstjóri*

*(Mynd: sorvag.fo)*

**Hvør ár er 10. flokkur í Sørvági og vitjar Sørvágs kommunu og fær eina neyva kunning um, hvat eitt bygdaráð er og alt lógarverk og nevndararbeiði aftan fyri ráðið og kommununa**

**UNGDÓMUR**
*Snorri Brend*

**Sørvágur:** Í farnu var 10. flokkur í Sørvági og vitjaði Sørvágs kommunu, saman við flokslæraranum Herálvi Jacobsen, sum er fyrrverandi bygdaráðslimur í Sørvági.

Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri, greiddi næmingunum frá um kommununa og um kommunalt arbeiði í síni heild. Síðani var tosað eitt sindur um, hvat tey vistu um kommununa og arbeiðið hjá einum bygdaráð.

Eftir hesa kunningina fingu næmingarnir 5 mál, sum Herálvur hevði sett saman, har tey skuldu spæla bygdaráð og taka støðu til hesi mál. Men fyrst skuldi eina borgarstjóri veljast og nevndir skipast.

Og tá ið bygdaráðið var skipað og borgarstjóri valdur, fóru næmingarnir til verka at viðgera málini, og var eitt av teimum, umsókn frá PF Bommsen um at sleppa at gera eina bommverksmiðju niðri við Sørvágsvatn.

Seinni fekk 10. flokkur møguleikan at uppliva ein veruligan bygdaráðsfund. Allir næmingarnir vóru møttir, tá ið bygdaráðið hevði fund seinnapartin henda dagin.

# Smokie spælir á Summar Festivalinum

**Lagt er upp til eina ordans syngið-viðkonsert á Vágsbøi í august mánaði**



Bólkurin við hittum sum Livin' Next Door To Alice, Oh Carol og Needles And Pins fer at spæla á Vágsbøi í august mánaði.

Bólkurin, sum talan er um, er sjálvandi Smokie, og tað er ein bólkur, sum kann velja millum eina ørgrynnu av sangum, sum fólk kenna.

Livin' Next Door To Alice, Oh Carol, Needles And Pins, Mexican Girl, Lay Back In The Arms Of Someone, I'll Meet You At Midnight og Boulevard Of Broken Dreams eru bara nakrir av sangunum, sum vælkendi enski bólkurin kann tríva í.

Smokie hevur nógvar fjepparar í Føroyum, og fjeppararnir fáa nú møguleikan at hoyra bólkin, sum sigst verða í góðum formi, spæla á størsta pallinum í føroyska tónleika-summarinum.